# Brimil verið royndartúr

**Sunnudagin á middegi fór Brimil á sína fyrstu ferð í føroyskum sjógvi sum vaktarskip. Skiparin, Jákup Müller, metir, at nakrar vikur ganga, áðrenn skipið veruliga er klárt**

BRIMIL
*Stefan í Skorini*

Leingi er tað, ið væl skal vera, sigur orðatakið, og soleiðis var eisini við nýggja vaktarskipi okkara, Brimli.

Leingi hava myndugleikarnir og fólk annars bíðað eftir skipinum, sum nú skal verja borg í havinum kring Føroyar. Brimil lá í Noregi í fleiri mánaðir, meðan Fíggjarmálastýrið og manningarfeløgini trættust um lønir.

Leygardagin klokkan 14 stevndi Brimil inn um molan í Havn, og við einum stórum fylgi av smábátum legði Brimil at bryggju, har stór mannfjøld var komin saman at skoða flaggskipið.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, flutti fram røðu, har hann frøddist um, at nýtt skip var komið við í flotan. Eisini var horntónleikur á skránni, og eftir hátíðarhaldið varð fólkið boðið umborð at hyggja nærri at hesum vælaverki.

Heldur trongligt var umborð hesa løtuna leygardagin, tí nógv fólk leitaði sær umborð.

### Royndartúr

Á middegi sunnudagin loysti Brimil fortoyningarnar og legði út á hav. Jákup Müller, ið er skipari umborð á Brimli, sigur, at hesin túrurin var meira at rokna sum royndartúrur.

Á sínum fyrsta túri stevndi Brimil á Norðhavi og helt síðani leiðina eystureftir. Túrurin endaði suðuri á Nólsoyarbanka, tá kósin varð sett aftur á Havnina.

– Hesin fyrsti túrurin hjá okkum var meira fyri at royna skipið og at sigla ordiliga við skipinum fyri at vita um alt riggar, sum tað skal, sigur Jákup Müller.

– Brimil hevur eina sera umfatandi telduskipan, sum verður stýrd av einum servara. Hana hava vit eisini fingið roynt á hesum fyrsta túrinum hjá okkum, sigur skiparin.

Mánadagin lá Brimil aftur við bryggju í Havn. Bíðað varð eftir at fáa tað seinastu útgerðina umborð, tí hon lá framvegis uppi á Sandvíkahjalla. Talan er um sleipiútgerð, lensiútgerð og aðra útgerð.

Hetta er týdningarmikil útgerð, sum Brimil má hava, áðrenn farið verður til verka av álvara. Í dag, týsdagin, var ætlanin, at Brimil aftur skuldi leggja til havs, men enn er ikki greitt, hvagar leiðin gongur.

Nøkur tól umborð hava eisini fyri neyðini at stillast eitt sindur betri, og serkønir menn vóru umborð til hetta arbeiði mánadagin.

### Væl nøgdir

Skiparin sigur seg vera ógvuliga væl nøgdan við skipið, og leggur dent á hvussu friðarligt tað er undir sigling.

Jákup Müller leggur afturat, at enn er ilt at siga nakað nágreiniligt um skipið, tí tað hevur ikki verið í drift. Næsti túrur hjá Brimli verður hinvegin kanska fyrsti veruligi túrur, sum verður gjørdur.

– At byrja við verður nógv venjing, tí vit eru als ikki von við skipið enn. Tá fáa vit at vita, hvat skipið kann, og hvussu skjótt vit kunnu arbeiða umborð, sigur skiparin.



*Brimil kom á Havnina leygardagin seinnapart, har nógv fólk var komið saman at skoða nýggja skipið. Sunnudagin var Brimil longu á Norðhavinum og helt skil á teimum mongu bátunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Nýggj tyrla um tvær vikur

**Nýggja tyrlan hjá Atlantic Airways kemur til landið um góðar tvær vikur. Hon skal nýtast í leiting og bjarging á sjónum í nýggju tilbúgvingarætlanini**

TYRLUFLÚGVING
*Stefan í Skorini*

Tá Fiskimálastýrið gjørdi av, at Atlantsflog skuldi taka sær av leiting og bjarging í nýggju tilbúgvingarætlanini, var longu greitt, at neyðugt var við eini nýggjari tyrlu.

Atlantic Airways hevur nú gjørt av at keypa eina av slagnum Bell 212 úr USA. Magni Arge upplýsir, at henda tyrlan kann væntast at vera í Føroyum seinast í hesum mánaðinum.

Ein føroysk sendinevnd hevur verið í USA fyri at kanna tyrluan nærri, og eftir øllum at døma vóru menn nøgdir við hesa nýggju tyrluna.

Atlantsflog hevur fleiri jørn í eldinum, tí oljufeløgini hava eisini valt Atlantsflog til at taka sær av øllum útgerðarvirksemi í oljuvinnuni saman við bretska felagnum Bristow.



*Nýggja Bell 212 kemur til Føroyar um góðar tvær vikur. Tyrlan skal fyrst og fremst nýtast í leiting og bjarging í tilbúgvingarætlanini*

# Tróndur í Gøtu fann fýra lík



*Tróndur í Gøtu*

**Tá týski trolarin Hansa gekk burtur fyri eini viku síðan, var Tróndur í Gøru eitt av skipunum, sum var við í leitingini eftir manningini**

SKIPSVANLUKKA
*Edvard Joensen*

Tróndur í Gøtu fann líkini av fýra av manningini av týska trolaranum, Hansa, sum gekk burtur í ein útnyrðing úr Írlandi fyri eini viku síðan.

Tá Hansa tann 6. mars sendi út neyðarkall, var Tróndur í Gøtu staddur stutt frá teimum. Teir fóru beinanveg til hjálpar, tá teir fingu boð frá eini írskari radiostøð um neyðarkallið, og vóru við í leitingini eftir manningini.

Tróndur í Gøtu bjargaði líkunum av fýra av manningini, sum lógu og flutu í yvirlivilsisbúnum. Tó høvdu teir ligið so mikið leingi í sjónum, at teir vóru deyðir, áðrenn teir vórðu funnir.

Umframt fann Tróndur í Gøtu eisini ein tóman gummibát og ein, sum ikki var uppblástur.

Eitt norskt skip bjargaði einum av manningini og tveimum líkum, sum flutu á sjónum, meðan ein bjargingartyrla bjargaði níggju av manningini úr einum bjargingarbáti.

Tá leitingin var av, fór Tróndur í Gøtu til Killybegs í Írlandi við líkunum, áðrenn farið varð aftur til fiskiskap.



# Fleiri starvsfólk eftir umvælingina

**Brúkarabólkur fyri svimjihøllina í Klaksvík mælir til, at upptøkutól verða sett upp í høllini fyri at betra um trygdina, og fleiri starvsfólk skulu setast**

UMVÆLING
*y un akst in*

**Klaksvík:** Trygdin í svimjihøllini í Klaksvík skal verða í hásæti. Tí skulu fleiri starvsfólk setast, og upptøkutól skulu setast upp í høllini.

Hetta sigur ein brúkarabólkur í tilmæli til Klaksvíkar kommunu. Bólkurin, sum var var mannaður við Tinu Purkhús, Dánjal Poulsen og John Færø, varð valdur av Klaksvíkar kommunu til at veita ráðgeving í sambandi við høvuðsumvælingina av svimjihøllini.

Svimjihøllin í Klaksvík skal umvælast fyri 25 milliónir krónur komandi árini, og mest átroknadi umvælingarnar byrja í summar.



*Brúkarabólkur fyri svimjihøllina í Klaksvík mælir til at seta fleiri starvsfólk og at kameratryggja hyljarnar eftir stóru umvælingarnar sum byrja í summar*

### Kameravakt

Brúkarabólkurin heldur, at hyljarnir og nýggja skreiðibreytin í høllini skulu tryggjast við upptøkutólum, sum kunnu fylgjast frá vaktarrúminum og billetsøluni.

– Allar nýmótans høllir eru kameratryggjaðar í dag, umframt at lívbjargarar ganga fasta vakt um hyljarnar upp á skift við kameravaktina, vísir bólkurin á.

Umframt upptøkutól í høllini, undirstrikar brúkarabólkurin, at tað verður neyðugt at seta fleiri starvsfólk eftir umvælingarnar.

### Onnur uppskot

Í leygardagsblaðnum greiddu vit frá, at brúkarabólkurin mælir til, at fleiri broytingar verða gjørdar í umvælingarætlanini.

Harafturat hevur bólkurin eisini umrøtt alternativ til ætlaðu umvælingarnar.

Bólkurin nevnir í stuttum aðrar møguleikar, so tað í framtíðini verður léttari at útbyggja høllina við 50 metra hyli, kemur tað upp á tal.

Eitt uppskot er eisini at byggja nýggjan hyljapart vestur úr høllini, hava verðandi svimjihøll opnað til nýggju hyljarnir eru lidnir, og síðani brúka svimjihøllina til frítíðarhøll við ymsum tilboðum.

## Drongur ákoyrdur av skutara

Fríggjakvøldið á midnátt varð ein drongur ákoyrdur av einum skutara á Tinghúsvegnum í Havn.

Drongurin slapp við smærri snuddum.

Løgreglan í Havn hevur annars havt eitt friðarligt vikuskiftið.

Sunnukvøldið var ein bilførari tikin fyri at koyra við kenning.

Alarmsentralurin fekk um vikuskiftið fráboðan um, at tað var eldur í úti í Tindhólmi. Tað vísti seg, at menn høvdu tikið niður eitt gamalt seyðahús og brent tað, men onkursvegna var kunningin millum hesar og alarmsentralin ikki í lagi.

**ek**

# Góð undirtøka fyri tarvakappingini



*Hesin tarvurin stóð upp á spæl í tarvakapping í Klaksvík leygardagin.*

*Mynd: SJH*

**Klaksvík:** Leygardagin skipaði hondbóltsfelagið Stjørnan fyri tarvakapping á fótbóltsvøllinum í Klaksvík.

Ein tvey ára gamal tarvur stóð upp á spæl, og nógv hundrað fólk vóru við í kappingini.

Tarvurin varð leiddur inn á vøllin, eftir fyrru dystirnar í Klaksvíkskappgini í fótbólti, og tað tók nakrar tímar, áðrenn tarvurin avgreiddi sín part.

Umframt tarvin vóru eisini flogferðaseðlar og fartelefon burturlutað.


KLÆNKISKEIÐ

Byrjar aftur 19. mars fram til 19. maj.

Vit bjóða tær:
- Feitt test
- Kontrolvigast 1 ferð um vikuna
- Kostráð
- Styrkivenjing (nýggjar Technogym maskinur)
- Spinning (spildurnýggjar Fitness Bike)
- Polar pulsmátara (mátar, um tú brennir feitt)
- Roynt, útbúgvið fólk til at hjálpa og stuðla tær.

Tíðirnar verða: Má. kl. 18:30 - 19:30 spinning
Hós. ella fr. kl. 18:00 - 19:30 styrkivenjing

Tilmelding í Fragd & Fimi leygardagin 17/3 millum kl. 14:00 - 17:00

GJALDAST SKAL VIÐ TILMELDING KR. 798,-

Fragd & Fimi
v/ Janu Thomsen, Dj. í Geilsgøta 5
FO-100 Tórshavn, Tlf. 31 71 00
E-mail: fragd@post.olivant.fo
Heimasíða: fragd.olivant.fo

OPIÐ ER:
Má.-Mik.-Fr. kl. 12:00-21:00
Tý.-Hó. kl. 07:00-10:00 + 15:00-21:00
Leygardag kl.14:00-17:00

Sosialurin 311820